VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum
Nr. 245 - 22. desember 2004



*Á kanningarferð í Qaanaaq í Norðurgrønlandi*



*Drongur í Qaanaaq fær kannað hoyrnina*

*Framhald av s. 21*

granskingarmálaráðharran, Frank Jensen, at fáa til vega fígging til føroyska gransking á sama hátt, sum pengingur verður settur av til polargransking. Saman við áheitanini var ein granskingarætlan, sum føroyskir granskarar høvdu latið landsstýrinum við umbøn at kanna møguleikarnar fyri fígging. Danska granskingarmálaráðið og granskingarráðini settu ein útgreiningarbólk við hesum kommissorium "At vurdere det samfundsmæssige videnskabelige behov og muligheder for forskningsaktiviteter, der belyser Færøernes natur (inkl. de omgivende farvande) miljøforhold, kultur og erhvervsmæssige muligheder og sundhedsmæssige forhold. At beskrive forskellige modeller for organisering af indsatsen, herunder virkemidler, forskeruddannelse og færøske forskergruppers deltagelse i indsatsen og placering i ledelsen heraf."

Sett var ein ellivu-manna nevnd av væl kvalifiseraðum fólki. Úr Føroyum: Jóan Pauli Joensen, professari, og Bogi Hansen, deildarleiðari. Í bóklingi, sum er givin út av danska granskingarráðnum 1996, sæst, at til gransking í 1996 vórðu millum 17 og 22 ársverk, 8 teirra alment fíggjað í Føroyum. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at í Føroyum vóru íløgurnar í gransking rættiliga avmarkaðar. Nevndin mælti til, at neyðugt var at økja um talið á PhD-lesandi og til tess at fasthalda góðar granskarar í Føroyum, átti eisini at verða sonevnd post doc stipendiir, t.v.s granskarastarv til teirra, sum hava skrivað sína doktararitgerð. Eisini mælti bólkurin til at gera tað møguligt hjá útlendskum granskarum at koma hendan vegin og føroyskum at fara burtur. Bólkurin mælti til, at gransking innan náttúru og náttúrutilfeingi og innan umhvørvi og heilsu áttu at raðfestast hægst. Í alt mælti bólkurin til, at 15 mill. kr. um árið vórðu avsettar í fimm ár til tess at fáa gongd á føroyska gransking.

Hetta arbeiðið hevði við sær ávísar játtanir, men langt burtur frá tí, sum bólkurin mælti til.

## Fortreytir fyri gransking

Ein fortreyt fyri gransking er, at vit hava fólk við hóskandi útbúgving, og tað haldi eg ber til at siga, at vit hava. Ikki tí øll hesi eru búgvin at granska einsamøll, men tað ber til í dag at gera samstarv við vegleiðarar, sjálvt um teir ikki búgva á staðnum. Gransking í Føroyum kann eftir mínum tykki býtast upp í tveir høvuðspartar:

Tann fyrsti er tann gransking, sum hevur við føroyska mál, mentan, søgu og samfelagsviðurskifti at gera. Hesa gransking verða vit í høvuðsheitum noyddir at gjalda sjálvi. Tað er ikki óhugsandi, at útlendskir granskingargrunnar játta pengar í hesa gransking, men tað er minni sannlíkt og í hvussu so er verður tað trupult, tí úrslitini eru ikki so áhugaverd fyri útlendingar sum fyri okkum sjálvi.

Hin parturin er gransking innan umráði, har vit í Føroyum eru áhugaverd, tí tað viðvíkur eisini evnum, sum onnur samfeløg eru áhuga í. Her kunnu vit nevna havið um Føroyar, lívið í havinum, veðurlagsbroytingar og umhvørvisdálking, sum fer um landamørk og ávirkar djóralív og menniskju. Og so eru føroyingar sjálvir kanska eisini áhugaverdir - um vit hugsa um tað, sum íslendingar hava sett í verk innan ílegugransking. Á hesum økjum ber til at søkja um samstarv við onnur og fígging frá útlendskum granskingargrunnum, bæði almennum og privatum.

Tann vinnuliga granskingin ella menningin hevur sítt natúrliga útgangspunkt í fiski og fiskaframleiðslu og í øðrum lagi í skipum. Hetta eru meginumráði, sum hevur alheims áhuga, og tí er væl hugsandi, at góðir møguleikar eru at fáa samstarv við onnur og harumframt fígging. Eitt nú frá ES, sum fegin vil integrera privata og almenna virksemið innan gransking og menning.

## Samstarv

Tosa vit um gransking í altjóða høpi, er tað eftir mínari meting ikki bara ein møguleiki, men beinleiðis neyðugt. Tann tíð er farin, har tað ber til at arbeiða í sjálvdrátti. Sjálvt um nógv granskingarvirksemi er víða um heim, so eru tey, sum arbeiða í einum ávísum umráði, lutfalsliga fá, og her er tí eitt neyvt samstarv bæði ein fyrimunur og beinleiðis neyðugt.

Tá ið vit tosa um gransking, skulu vit minnast til, at tað snýr seg um at finna fram til nýggja vitan, t.v.s., at tá eru vit í kapping við allan heimin. Tað er soleiðis eingin grund til at gera ta næstbestu granskingina. Málið skal sjálvandi altíð verða, at tað ein ger, óansæð um tað er lítið ella stórt, er fyrsta floks.

## Framtíðin

Loyvi mær eisini at koma við nøkrum almennum hugsanum um tørvin á gransking í Føroyum. Um eitt samfelag sum okkara skal hava framtíðarmøguleikar, er tað neyðugt, at vit eisini troyta tað tilfeingið, sum vitan er. Vit hava jú brúkt almikið av peningi til at skapa fortreytirnar fyri vitansframleiðslu, við tað at vit hava skúlað okkara fólk heilt frá sjey árs aldri til í summum førum seint í tjúgunum. Sjálvandi skulu vit so royna at finna mátar, har henda skúling kann bøta um okkara framleiðslu; til at finna nýggjar leiðir at ganga innan tilvirkan av tilfeinginum úr havinum í víðastu merking og møguliga eisini á summum umráðum at fáast við grundgransking.

Eftir mínum tykki hava vit ikki møguleikar fyri at halda tað livistøði, sum vit hava í dag, um vit ikki seta á og kýta okkum innan nýskapan, menning og gransking. Við at nýta myndina við einum urtagarði, skal eg loyva mær at minna á, at slíkt hendir ikki frá degi til dags At ala fram ein góðan og vakran urtagarð er ikki løtuverk. Tú skalt velja røttu planturnar, tú skalt velta moldina, tú skalt taða, tú skalt finna lívd - serliga í byrjanini, tá vøksturin er smáur og viðkvæmur, men sum frálíður tekur garðurin seg fram, og við tíðini verður hann bæði til íblástur, men eisini til gagns, tá ið væl fruktar. At seta gransking við er sum at fáa sær urtagarð, men minnist til, at sjálvt um tað tekur nógv ár at fáa ein góðan garð, tekur tað bara eina løtu at forkoma øllum.





*Fyrireikingar til kanning av heilanum.*